FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 5. mai 2020
J. nr.: 20/00201

Svar uppá spurning nr. 72/2019 eftir § 52a í tingskipanini

Spurningur frá Kristinu Háfoss, løgtingskvinnu, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um føroyska Talgilda Samleikan, netbankan og danska NemID.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Metir landsstýrismaðurin, at tað er rætt at seta krav um at skula útvega sær danska NemID fyri at kunna nýta netbanka og lønarportal í Føroyum?
2. Hví verður krav um hetta sett fram júst nú?
3. Metir landsstýrismaðurin, at tað verður ein vansi fyri gagnnýstlu og útbreiðslu av føroyska Talgilda Samleikanum, um fólk í Føroyum fyrst skulu skifta til danska NemID, fyri síðan at flyta til ein føroyskan Talgildan Samleika eftir fáum mánaðum?
4. Heldur landsstýrismaðurin, at rættast hevði verið, at føroysku peningastovnarnir varðveittu frælsi hjá føroyingum at velja innritingarloysn, til nýggi føroyski Talgildi Samleikin kann nýtast til netbankan v.m.?
5. Fer landsstýrismaðurin at taka stig til at fáa semju við føroysku peningastovnarnar um at sleppa kravinum um, at fólk í Føroyum skulu nýta danska NemID?

Svar til spurning 1
Tað er óheppið fyri Talgildu Føroyar, at avtøkan av Cryptomatic (gomlu innritanini) kemur næstan samstundis, sum fari verður undir at íverkseta føroysku loysnina kallað Samleikin. Hetta merkir, at nakrir brúkarir verða noyddir at skifta millum tvær loysnir við stuttum millumbilum. Samleikin skuldi takast í nýtslu 29. mai, men vegna COVID19 farsóttini verður hetta helst í august/september. Farið verður ístaðin at taka samleikan í brúk fyri útvaldar brúkarar í juni og juli mánaða.

Tað var annars í mars mánaða í 2015, at undirritaði og landsstýrismaðurin í vinnumálum gjørdu avtalu við peningastovnarnar um at sleppa kravinum at brúka NEMID og at føroyingar framhaldandi kundu brúka Cryptomatic (gomul innritan) og at peningastovnarnir fóru at taka lut í at menna Talgildu Føroyar.

Svar til spurning 2
Sambært almennu frágreiðingini frá peningastovnunum er orsøkin, at trygdin ikki er nóg góð.

Svar til spurning 3
Peningastovnarnir hava upplýst, at meginparturin av føroyingum brúka NemID. Avbjóðingin er sostatt, at nøkur mugu skifta tvær ferðir innan rímiliga stutta tíð – umleið 1 ár. Tað hevði sjálvandi verið lættari fyri Talgildu Føroyar, um hesi sluppu undan at skifta tvær ferðir.

Svar til spurning 4
Peningastovnarnir meta, sambært almennari fráboðan, at innritanin er ótrygg.

Svar til spurning 5
Tað er landsstýrismaðurin í Umhvørvis- og vinnumálum, sum umsitur Peningastovnsmál. Eg umsiti Talgildu Føroyar.

Tinganes, 05. mai 2020

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum